# Evnisvika á Studentaskúlanum á Kambsdali

Týsmorgunin vóru ikki nógv fólk at síggja á Studentaskúlanum á Kambsdali. Orsøkin var ikki illveðrið, men eitt heldur øðrvísi tiltak, ið lærararáðið hevur tikið stig til. Tiltakið, talan er um, er ein evnisviku, sum byrjaði mánamorgunin.

Í hesum døgum er øll vanlig undirvísing tikin av skránni, og ístaðin arbeiða allir næmingarnir við einum og sama evni, sum í ár er Agenda 21.

Eitt av slagorðunum í Agenda 21 er, at tú skalt hugsa globalt og handla lokalt. Tí skulu næmingarnir út at arbeiða við einstøku kommununum, kanna hvat er gjørt, hvat ikki er gjørt og hvat kann gerast í Agenda 21 høpi.

Næmingarnir eru bólkaðir geografiskt, soleiðis, at næmingar, sum t.d. búgva í Sundalagnum arbeiða við Sunda Kommunu, og fuglfirðingarnir arbeiða við Fuglafjarðar Kommunu. Í alt er talan um 23 bólkar, harav ein bólkur arbeiðir við eini heimasíðu, og ein tekur sær av PR-arbeiði.

Mánadagin vórðu næmingarnir kunnaðir um Agenda 21. Týsdagin og í dag arbeiða næmingarnir úti í einstøku kommunum. Evnisvikan endar hósdagin við almennari framsýning.

# Grønt samstarv

Rektarin á Kambsdali ynskir, at studentaskúlin verður grønari, og at samstarvið millum næmingarnir verður styrkt.

Í hesum døgum hava næmingarnir á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum í Eysturoynni evnisviku, har evnið er Agenda 21. Skúlin hevur áður skipað fyri evnisviku, og hevur tað eydnast teimum so væl, at hetta er vorðið eitt afturvendandi tiltak.

– Tað er sera týdningarmikið, at duga at samstarva í gerandisdegnum. Tað er ikki minst førleikan at samstarva, tú lærir við at hava evnisviku. Útbúgvingarskipanin eggjar ikki so nógv til samstarv, tí talan er fyrst og fremst um faklig krøv til hin einstaka. Hetta kendu næmingarnir í síðstu viku, tá ið teir skrivaðu høvuðsuppgávu, søguritgerð og støðisritgerð. Evnisvikan er ein øðrvísi avbjóðing, sum leggur upp til samstarv og ítøkiligar loysnir á viðkomandi trupulleikar. Tað er mín fatan, at næmingarnir trívast væl í hesum, sigur Sámal í Skorini, rektari á Studentaskúlanum og HF-skeiðnum á Kambsdali.



*Næmingar úr Leirvík vitja hjá IRF, har Ingvard Fjallstein greiddi frá*

## Tað grøna er ókent

Ein partur av upplegginum hjá Agnari Jensen mánamorgunin snúði seg um hugtakið "grønur skúli". Spurdur um hetta var endamálið við evnisvikuni, svaraði Sámal í Skorini, at tað var avgjørt nakað, sum tey á skúlanum hava hugsað um.

– Hetta er ein spennandi avbjóðing. Tað fylgja ivaleyst krøv við, sum vit enn ikki eru greið yvir. Nú fara vit at kanna hetta, og so fara vit at arbeiða víðari við tí orku, sum vit hava. Talan kann verða um krøv, sum bera meiri kostnað við sær. Eitt nú, um allar ljósperurnar, vaskievnini og rútarnir skulu skiftast út í senn. Men hendan vikan er so ein byrjan - nú hava vit sett sjøtul á.

Skrivað og tikið myndir:
Hanna Ólavsdóttir
Ottar í Hjøllum
Ovi Magnussen
Rólant Waag Dam
Rúni Weihe
Maria í Brekkunum

# Úr vinnuni og í Agenda 21

Frá at hava verið talsmaður hjá ráfiskakeyparunum, er hann nú vorðin Agenda 21-samskipari fyri Føroya kommunufelag

Hann hevur arbeitt hjá Eimskip í nøkur ár, og sum fiskakeypari hevur hann eisini roynt seg. Eisini hevur hann arbeitt í Vinnuhúsinum sum talsmaður hjá ráfiskakeyparunum. Ja, vinnuroyndirnar hevur hann nógvar. Maðurin er Agnar Jensen sum síðani august 2004 hevur starvast hjá Kommunufelagnum sum Agenda 21-samskipari.

Agnar Jensen er settur í starv hjá Kommunufelagnum við tí fyri eyga at kanna og kunna um møguleikarnar við Agenda 21-ætlanini. Hann hevur ferðast kring landið og havt fyrilestrar í bý- og bygdaráðum. Úrslitið hevur verið gott, tí bý- og bygdaráð tykjast at taka undir við hesi ætlan, sigur Agnar Jensen.

Tað eru uttan iva mong, ið meta at starv sum vinnulívsmaður og starv sum Agenda 21-samskipari at vera í andsøgn við hvørt annað. Innan vinnulívið er týdningarmikið at hava yvirskot, og tískil tykist tað ofta kostnaðarmikið at fara undir umhvørvisvinarliga framleiðslu.

Agnar Jensen er ikki samdur í, at vinnulív og umhvørvi eru mótsetningar. Hinvegin heldur hann, at umhvørvis-, búskapar- og samfelagsmenning eru øll fortreytir fyri hvørjum øðrum. Um menning innan eitt av hesum økjunum ikki tekur fyrilit fyri hinum báðum, verður hetta fyrr ella seinni drigið niður við hinum báðum, sigur hann.

Agenda 21-ætlanin sær umhvørvis-, búskapar- og samfelagsmenning sum eina ringrás, ið annaðhvørt kann ganga væl ella ikki. Gongur ringrásin væl, er talan um burðardygga menning.

Spurdur, um tað er áhugi fyri Agenda 21-ætlanini millum politisku myndugleikarnar, sigur Agnar Jensen, at Agenda 21 fyri fyrstu ferð varð tikið við í eitt samgongu-skjal, var hjá núverandi samgongu. Hetta er eitt stig rætta vegin, ið vónandi fer at stuðla undir størri atliti til umhvørvi, tá hugsað verður um búskapar- og samfelagsmenning, sigur Agnar Jensen.

## FAKTA

Agenda = ætlan 21 = 21. øld

Agenda 21 er ein sáttmáli, sum tryggjar burðardyggari menning. Burðardygg menning merkir, at tørvirnir hjá fólkinum í heiminum nú og í framtíðini kunnu nøktast. Samstundis skulu umstøðurnar fyri at tørvirnir hjá okkara eftirkomarum heldur ikki verrast.
Á umhvørvisráðstevnuni í Stokkhólmi í 1972 fóru politikarar at hugsa nógv meira um umhvørvið. Semja varð um, at umhvørvi og menning hanga saman.
Sum úrslit av ráðstevnuni varð UNEP, umhvørvisskráin hjá ST, sett á stovn. Heimsnevndin, við norsku Gro Harlem Brundtland á odda, gav í 1987 út frágreiðingina Felags framtíð okkara. Í frágreiðingini varð fyri fyrstu ferð talan um burðardygga menning.
Ì 1992 varð tiltikni toppfundurin í Rio hildin. Á fundinum luttóku ríkisleiðarar og stjórnarumboð úr 181 londum. Á fundinum vórðu 5 skjøl undirskrivað. Agenda 21, sum tryggjar burðardygga menning samfelagsliga, búskaparliga og umhvørvisliga, Rio frágreiðingin um umhvørvi og menning, kunngerðin um skógarvinnu, altjóða veðurlagssáttmálin og sáttmálin um lívfjølbroytni.
10 ár seinni varð í Johannesburg hildin ein onnur ráðstevna, har fleiri tíggjutúsund menniskju savnaðust úr øllum heiminum. Har varð lítið gjørt fyri aftur á úrslitini seinastu 10 árini, og har varð avrátt hvat skal gerast fyri betur at fremja tað, sum av fyrstan tíð var sett fyri. Ein máti at styrkja Agenda 21 uppá, ella at seta Agenda 21 í verk umaftur.

